

*Talið av føddum børnum er minkað, tí færri kvinnur vóru at føða børnini*

# Fáa framvegis nógv børn

**Ongastaðni í Evropa føða kvinnurnar so nógv børn sum í Føroyum. Men nú má samfelagið skipa so fyri, at kvinnurnar í barnsburðaraldri ikki rýma av landinum, sigur Hans Pauli Strøm, samfelagsfrøðingur á Hagstovu Føroya**

Randi Jacobsen

Í heilsulýsingini hjá Landslæknanum stendur, at í fjør komu 618 í verðina í Føroyum, og hetta talið er tað lægsta í fleiri ár.

Men tað talið einsamall sigur einki. Neyðugt er at hyggja eftir, hvørjar orsøkirnar til lækka barnatalið kunnu vera.

Hans Pauli Strøm, samfelagsfrøðingur vísir á tvær høvuðsorsøkir.

– Ein orsøk er, at í bólkinum, sum fær flest børn, eru døturnar hjá teimum, sum rýmdu úr Føroyum í kreppuni í 90-árunum. Tær kvinnurnar eru millum 25 og 29 ár, sigur hann.

Fyri 25 árum síðan taldi tann aldurbólkurin í Føroyum 1625 kvinnur. Í fjør vóru tær 1099 kvinnur.

– Talið var dramatiskt lágt í fjør, sigur Hans Pauli Strøm.

Frá 1985 til 2009 vaks fólkatalið annars úr 45.318 til 48.680.

Ein onnur orsøk til lága barnatalið í fjør er tann einfalda, at árgangirnar av kvinnunum í áðurnevnda aldrinum vóru smáir. Summir árgangir eru smáir, og aðrir stórir, uttan at tað altíð ber til at staðfesta orsøkina.

Hans Pauli Strøm sigur, at ikki er neyðugt at rópa varskó, fyri tað um færri børn vórðu fødd í fjør.

Út frá hagtølunum hjá Hagstovu Føroya kann Hans Pauli Strøm ávísa, at stórir aldurbólkar at komandi mammum eru á veg. Talið av gentunum millum 10 og 14 ár liggur um 1800, og tað sama ger aldursbólkurin millm 1 og 19 ár.

– Men harfyri mugu vit ikki seta okkum upp afturá og siga, at væl stendur til. Samfelagið má skipa so fyri, at fleiri ungar kvinnur ikki rýma av landinum og ongantíð koma aftur. Tað er sunt at fara burtur at fáa sær útbúgving ella í aðrar mátar at menna seg, men tað má ikki henda, at kvinnurnar rýma av landinum undan skerjingum og sparingum.

### Barnaríkar familjur

Í føðidugnaliga aldrinum eru kvinnurnar millum 15 og 49 fólk. Í fjør fingu kvinnurnar í miðal 2,3 børn, og hetta tal hevur ligið nøkulunda javnt í fleiri ár.

Talið skal liggja oman fyri tvey, skal fólkatalið í einum landi ikki minkað.

Ein sammeting við hagtølini í hinum evropeisku londunum vísir, at ongastaðni í Evropa føða kvinnurnar so nógv børn sum í Føroyum.

Í fleiri evropeiskum londum liggur talið væl niðan fyri tvey, og einasta orsøk til, at fólkatalið í teimum londunum ikki minkar, er, at fólk úr øðrum londum floyma inn um markið.

Hans Pauli Strøm ivast ikki í, at føroyskar kvinnur fáa so nógv børn, tí føroyska samfelagið er so barnavinarligt. Tey, sum velja at flyta heim aftur til Føroya siga øll, at tey fluttu heim fyri at vera nærri hjá familjuni. Í Føroyum kunnu flestu børn eisini frítt fara út at spæla.

– Tað er ikki tað sama sum at búgva á fimta sali í einum stórbýi eitt ella tvey vaksin fólk við børnum, og fleiri hundrað kilometrar eru til næstringar, sigur Hans Pauli Strøm.

# Færri doyggja av hjartasjúku

**Betri viðgerð og sunnari lív hava við sær, at færri nú doyggja av hjartasjúku**

Randi Jacobsen

Fara vit aftur um 1990, doyðu heilt nógv fólk av hjartasjúku.

Hjartasjúka er framvegis vanlig deyðsorsøk, men tilburðirnir eru ikki so nógvir sum áður. Krabbamein hevur yvirhálað hjartasjúkurnar sum deyðsorsøk.

– Talið hevur verið fallandi í øllum Norðurlondum síðan fyrst í 90-árunum. Tey fyrstu tíggju árini vóru orsøkirnar til tað nýggir viðgerðarmøguleikar og nýggjur heilivágur, sigur Hans Petur Nielsen, hjartalækni á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Tilburðirnir av hjartasjúku sum deyðsorsøk hava hildið fram við at falla, og fyri tey seinastu tíggju árini er tað av øðrum ávum.

– Nú hevur tað verið tað fyribyrgjandi arbeiði, sum hevur gjørt sítt. Broyttur lívsstílur, sunnari matvanar, og at fleiri eru givin at roykja. Tað minkar um vandan fyri at fáa hjartasjúku, tá ið fólk liva sunt, sigur Hans Petur Nielsen.

*Tað er farið at síggjast aftur í heilsulýsingini, at nógv fólk nú liva sunnari, eta minni feitan mat og røra seg meira*

